# Myrdi níggju fólk

Ein maður hevur skotið minst níggju fólk í amerikanska statinum Alabama., men løgreglan væntar at finna fleiri deyð. Sorgarleikurin byrjaði í gjár í býnum Samson, har fimm fólk vórðu funnin deyð í einum húsvogni, teirra millum eitt tríggjar mánaðar gamalt barn. Úr Samson legði drápsmaðurin leiðina til býin Geneva. Á vegnum loysti hann fleiri skot av eftir løgreglubilum og øðrum bilum, og ein bilførari lat lív. Í Geneva beindi drápsmaðurin fyri mammu síni og einum øðrum fólki, áðrenn hann gjørdi av við seg. Løgreglan roynir nú at fáa greiði á, hví maðurin bar seg soleiðis at. Sagt verður, at málið er sera torgreitt.



# Givnir at tingast um Shalit

Myndugleikarnir í Turkalandi eru givnir við royndini at fáa Hamas at lata ísraelska hermannin Gilad Shalit leysan. Shalit bleiv tikin og burturfluttur fyri næstan trimum árum síðani og hevur verið fangi í Gaza-geiranum síðani. Ísraelskir talsmenn hava í seinastuni bent á, at tað gekk tann rætta vegin við tingingunum, men í gjár skrivaði saudiarabiska blaðið Al-Watan, at turkar eru givnir við royndini at fáa Hamas at lata ísraelska hermannin leysan. Foreldrini hjá Gilad Shalit hava nú sett tjald uttan fyri bústaðin hjá Ehud Olmert, forsætisráðharra, og har ætla tey sær at dvølja, til sonurin er komin aftur.

# 18 mans fáa kjans



*Skipini vórðu løgd í mai mánaða í fjør, tá raksturin ikki fekst at hanga saman. Nú útlitin eru betri, loysa tey aftur, samstundis sum 18 mans fáa hýru umborð*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

**Nú ísfiskatrolararnir Nornagestur og Kolumbus loysa aftur, fáa 18 mans kjans við hesum báðum skipum, sum hava ligið síðan í mai mánaða í fjør**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá partafelagið Vár í Vestmanna, sum eigur gomlu ísfiskatrolararnar, Nornagest og Kolumbus, gjørdi av at leggja skipini í mai mánaða í fjør, segði annar av eigarunum, Tummas Christophersen, at teir valdu at taka hetta stig, meðan teir enn kundu svara hvørjum sítt.

Um hetta mundið vóru oljuprísirnir í hæddini, og Tummas saman við hinum eigaranum, sum er Dánjali Jacobsen, mettu ikki, at útlit vóru til líkinda rakstur.

Men nú er vent í holuni. Oljuprísirnir eru nógv lækkaðir, nógvur upsi hevur verið at fingið, og nú eitt nú prísirnir á toski og serliga hýsu hava verið sera vánaligir, hevur prísurin á upsa harafturímóti hildið sær rættiliga væl.

Eigararnir hava tí gjørt av at gera skipini klár til at loysa aftur, og gongst sum ætlað, eru tey aftur á fiskiveiði einaferð í næstu viku.

### Fleiri fáa kjans

Tummas Christophersen, reiðari, sigur, at skipini eru í hampiliga góðum standi og væl hevur verið ansað eftir teimum hesar mánaðirnar, meðan tey hava ligið í Vestmanna.

– Nú stóðu skipini fyri árligu klassingini, og hetta arbeiði verður nú gjørt hjá Mest á Skála.

Hann sigur, at umframt vanliga árliga klassing, skulu skipini bæði eisini hava aksiltrekk.

– Seks mans verða við hvørjum skipi, og ætlanin er, at tey skulu sigla við umleið trimum manningum, soleiðis at menn kunnu skiftast um at vera umborð og í landi.

Hann sigur, at brúk verður fyri nøkrum monnum, bæði dekkarum og navigatørum, og at menn eru vælkominir at venda sær til felagið.

– Skipini eru mannað í maskinrúminum, men enn vantar okkum onkrar menn á brúnni – og uppaftur fleiri á dekkinum, leggur reiðarin í Vestmanna aftrat.

### Hampilig útlit

Tummas Christophersen heldur, at nú oljuprísirnir eru munandi lækkaðir, upsafiskiskapurin hevur verið góður, og prísirnir á upsa hava hildið sær rímiliga væl, eru útlit til, at raksturin fæst at hanga saman.

– Jú, vit halda, at útlit nú eru til, at skilagóður rakstur fáast í raksturin, sigur reiðarin í Vestmanna.

# Vestmenningur og Fram skifta motor



*Vestmenningur og Fram á bedingina hjá Mest í Havn, har nýggir motorar verða settir í skipini*

*Mynd: Karstin Vang*

**Næstu átta vikurnar verða Vestmenningur og Fram úr vinnu, nú skipini skulu skifta motor á Mest í Havn**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað gekk væl hjá Vestmenningi og Fram í fjør, og higartil í ár hevur fiskiskapurin hjá skipunum eisini verið góður. Umframt vanligu veiðimøguleikarnar við upsa undir Føroyum, hava skipini eisini loyvi at veiða gulllaks í vertíðini, sum byrjar seint í vár ella tíðliga í summar.

Í fjør eydnaðist gulllaksatíðin væl hjá øllum seks skipunum, sum vóru á hesi veiði.

Tummas Christophersen, sum eigur meginpartin av Vestmenningi og Fram, ið eru fyrrverandi Hádegisklettur og Stígarklettur, sigur, at bæði skipini verða tikin upp á bedingina í Havn næsta mánadag.

– Vit hava fingið at vita, at arbeiðið at taka gomlu motorarnar úr skipunum og seta teir nýggju í, fer at taka einar átta vikur tilsamans.

Hann sigur, at skipini soleiðis verða klár at fara aftur til fiskiskap, tá gulllaksavertíðin byrjar.

Vestmenningur og Fram, sum eru gomlu dalstrolararnir, eru smíðaðir á Tórshavnar Skipasmiðju árini 1988 og 1989.

Reiðarin í Vestmanna sigur seg hava hampiliga góðar vónir fyri 2009, nú oljuprísirnir eru lækkaðir, upsafiskiskapurin er góður, og prísirnir á upsa hava hildið sær hampiliga væl.

– Jú, hetta sær hampiliga væl út, sigur Tummas Christophersen.